# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Eg havi tikið doping, og eg havi tikið EPO*

*Bjarne Riis*

# 158 fjølmiðlafólk á Tórsvølli

**Neyðugt verður hjá FSF at seta tjald upp við niðara vøll, so tey mongu fjølmiðlafólkini kunnu hýsast**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Mándagin komu fleiri bussar hjá italskum sjónvarpsliði til Føroya*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Um Føroyar leygardagin fara at megna at fáa stig, tá ið mótstøðuliðið á Tórsvølli verður italsku heimsmeistararnir, so verður talan um eina tí størstu sensatiónina nakrantíð í altjóða fótbóltssøguni – eisini størri enn tá ið Føroyar vunnu 1-0 á Eysturríki í Landskrona fyri knappliga seytjan árum síðani.

Tað verður fullsett kring Tórsvøll, og tað er greitt, at metið hvat tíðindafólkum viðvíkur verður tikið leygardagin.

At tað kring fótbóltsheimin ikki uttan víðari fer aftur við borðinum, at Italia fer at vitja í Føroyum sæst á listanum yvir fjølmiðlafólk, sum fara at møta upp leygardagin.

Tað er ikki bara ítróttarliga, at avbjóðingin móti heimsmeistarunum er størsta takið, sum føroyskur fótbóltur skal undir. Eisini fyrisitingarliga er talan um rimmar uppgávu.

21 myndafólk, 61 skrivandi tíðindafólk, 18 útvarpsfólk og 58 sjónvarpsfólk hava teknað seg til dystin. Tað er væl meiri enn metið innan fjølmiðlaumboðan higartil. Tað varð sett, tá Týskland vitjaði. Tá vóru um 115 fjølmiðlafólk til staðar.

Umframt mongu fjølmiðlafólkunum, so skal FSF eisini hýsa hópin av sonevndum VIP'arum. Hesi verða úti við 300 í tali, og tí er ikki hugsingur um at hýsa øllum í sjálvum FSF-húsinum. Tí verða tvey tjøld sett upp á Niðara vølli í Gundadali. Eitt til fjølmiðlafólkini og eitt til part av VIP-gestunum. Seinastu 120 VIP'ararnir sleppa at halda til í sjálvum FSF-húsinum.

# Oddbjørn fekk sekkin

**At tað ikki eydnaðist AB at vinna botnuppgerðina móti VB/Sumba tóktist vera dropin, sum sendi Oddbjørn Joensen úr AB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seks stig eftir 11 dystir. Tað er laka úrtøkan, sum AB hevur havt fyrsta partin av fyrsta Formula-árinum, og tað var leiðslan í felagnum ikki nøgd við.

Í tíðindaskrivi, sum er lagt á heimasíðuna, verður staðfest, at samstarvið millum felagið og venjaran, Oddbjørn Joensen, er slitið, og at felagið fyribils hevur sett Terja L. Hansen sum venjara hjá hópinum.

Oddbjørn Joensen var venjari, tá AB í 1999 byrjaði leiðina úr fjóðru deild upp móti føroysku fótbóltstindunum. Uppflyting til triðju deild varð vunnin fyrsta árið, men tá felagið flutti í aðru deild, hevði Sámal Erik Hentze tikið við sum venjari.

Eftir at uppflyting til Formula-deildina varð vissað, varð Oddbjørn í vetur settur sum venjari hjá felagnum, har málið var at halda sessinum í Formula-deildini.

Við sigri á B36 í kappingini um Løgmanssteypið fekk AB eina framúr byrjan upp á kappingarárið, men í landskappingini hava teir tó ikki livað upp til hetta. Einasti sigurin á árinum er vunnin móti Skála á útivølli, og hartil hevur AB á heimavølli fingið javnleik móti GÍ, HB og VB/Sumba.



*Eftir 11 umfør er Oddbjørn Joensen triði venjarin, sum fær sekkin í ársins útgávu av Formula-deildini*

# Sámal hevur givið avboð

**Tíðliga í dystinum móti EB/Streymi noyddist GÍ-liðskiparin av vøllinum við vøddaskaða**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo*

– Hetta er av fanan og til. At fáa møguleikan at spæla móti heimsmeistarunum kemur kanska ongan tíð aftur í lívinum, so sjálvandi var hetta ein dystur, sum eg havi glett meg heilt nógv til.

Lagið á Sámali Joensen var einki serligt, tá hann í gjárkvøldið gav landsiðsvenjaranum, Jógvani Martin Olsen, avboð til komandi landsliðsuppgávurnar móti Italia og Skotlandi.

- Talan er um ein fipurskaða í lærinum. Hvussu leingi tað tekur at vinna á hesum, veit eg ikki, men vónandi kann eg vera við aftur, tá vit um tvær vikur spæla móti AB, sigur Sámal Joensen.

Hinvegin kann Jógvan Martin fegnast um, at Súni Olsen eftir øllum at døma er tøkur.

- Súni hevur vant við fullari ferð í vikuni, og tað hevur gingið væl. Enn hevur bóltur tó ikki verið við, men boðini frá honum í dag vóru, at hann er klárur at spæla, sigur Jógvan Martin Olsen.

Eftir avboðið telur landsliðshópurin nú 20 spælarar. Av hesum er Fróði Benjaminsen leikbannaður til dystin móti Italia. Á dómaraseðilin sleppa tó bert 18 spælarar, og við evstamark okkara var ikki greitt, hvørt Jógvan Martin Olsen fer at taka nýggjan spælara í hópin fyri Sámal Joensen.

